Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Ábøtur í Sumbiartunlinum

Spurningar:

1. Hvørjar ætlanir eru um at gera ábøtur í Sumbiartunlinum, og nær ?
2. Nær kann roknast við at t.d. ljósviðurskifti, radiosamband, nógva støvið í tunlinum o.a. kemur í rættlag?
3. Er tað nøktandi, at ongin ventilatión er í tunlinum?
4. Lýkur tunnilin øll trygdar- og brunakrøv, og er tilbúgvingin nøktandi?

Viðmerkingar:
Viðlíkahald og dagføringar av tunlum er týdningarmikið bæði fyri trygd og tryggleika hjá teimum koyrandi. Tunnilin hevur nú nøkur ár á baki, og trygdarkrøvini, sum vóru, tá ið tunnillin varð gjørdur, eru ikki tey somu sum í dag.

Tað er eyðsýnt, at tunnilin til Sumbiar krevur ábøtur. Fá ljós lýsa í tunlinum. Nógv støv er, sum leggur seg á vegin, sum gerst hálur. Tunnilin er 3.000 metrar og ongin ventilatión er í tunlinum, og spurningurin er, um tað er nøktandi.

Somuleiðis verður landsstýrismaðurin biðin um at greiða frá, um tunnilin lýkur øll bruna- og trygdarkrøv, og um tilbúgvingin á staðnum er nøktandi skuldi eitt óhapp hent. Eisini verður landsstýrismaðurin biðin at greiða frá, hvørjar ábøtur og dagføringar roknast kann við verða gjørdar, og nær roknast kann við, at hetta verður gjørt.

Á Løgtingi, 16. mai 2022

Sirið Stenberg